## Amager byrjaði við javnleiki

Fremad Amager spældi í gjár fyrsta dystin í 2. Deild eystur eftir vetrarsteðgin. Dysturin var ímóti Greve, og spælt var á Amager. Anders Jochumsen skoraði tvey mál fyri Fremad Amager, men báðu ferðirnar svaraði Greve aftur. Eitt korter fyri leiklok fekk ein Greve-spælari reyða kortið, men hetta forðaði teimum ikki í at javna, eftir Fremad Amager helt seg hava gjørt sigursmálið seint í dystinum.




## Holst mátti lúta

Lyngby stríddist væl og koma á odda í dystinum ímóti FC Midtjylland sunnudagin, men teir bláu noyddust at lúta, tá ið alt kom til alt. Føroyski landsliðsspælarin Christian Lamhauge Holst spældi við hjá Lyngby frá byrjan, og hann var eisini við í uppspælinum til málið hjá Lyngby til 1-0. FCM kom tó fyri seg sum dysturin leið, og at enda hevði FCM skorað tvey mál og vann dystin.

# Neistarnir fuku á Skála




*Talan var um eina harða uppgerð, har liðini fylgdust stóran part av dystinum, men í síðsta enda var tað Neistin ið var omaná*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eftir átta ár oyðimarkargongd fekk Neistin loksins aftur handað gullheiðursmerki, tá høvuðsstaðarfelagið vann tætta dystin á Skála leygardagin. Rómurin var øgiligur í høllini, tá Áki Mørk staðfesti sigurin, og viðhaldsfólkini vóru skjót út á vøllin at fagna sínum hetjum**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*

Tað hevur verið langt millum snapsirnar. Seinast var tað 22 ár, hesu ferð átta.

Tá Áki Mørk í seinastu løtu staðfesti sigurin á 23-21 móti StÍF á Skála leygardagin, staðfesti hann samstundis fyrsta føroyameistaraheitið hjá Neistanum síðan aldarskiftið. Tað hevur ikki verið gerandisdagur í høvuðsstaðarfelagnum um páskini, nú Havnar býur er málaður bláur. Frálíkt ungdómsarbeiði seinastu árini undir leiðslu av núverandi venjaranum hjá StÍF, Claus Rasmussen, løgdu lunnar undir væl eydnaða kappingarárið í ár. Claus Rasmussen kundi tó einans hyggja at sínum fyrrverandi liðfeløgunum, sum leygardagin fegnaðust um gullheiðursmerkið.

Seinni finaludysturin á Skála lýsti væl kappingarárið hjá Neistanum. Teir hava runnið aftaná StÍF í øllum kappingarárinum, og soleiðis var leikgongdin eisini leygardagin. Í seinasta takinum vísti tað seg, at bláu havnarmenninir fóru avstað við øllum og kunnu nú rópa seg nú føroyameistarar í manshondbólti 2008.

### Heimaliðið tamarhald á

Tað hevur helst ofta kenst svárt hjá Sveini Justinussen at spælt hondbólt. Hann hevur seinnu árini staðfest sítt pláss millum teir bestu hondbóltsleikararnar, sum Føroyar hava uppalt. Hann hevur eginleikan at avgera dystirnar, og nær um hvørt vikuskiftið hevur hann avgerandi týdning, tá StÍF sigrar. Mótstøðuliðini halda tí ofta eitt vaki eyga við landsliðsleikaran, og hetta var sjálvsagt við í uppleggjinum hjá Neistanum. Teir mansvardu Svein Justinussen í stórum løtum av dystinum, og hetta tók broddin av atsóknunum hjá heimaliðnum. Neistin legði bragdligari fyri, og ein vælleikandi Jugoslav Djumic var ein støðug hóttan. StÍF ressaðist við aftur og vann sær eina lítla leiðslu. Heimaliðið hevði tamarhald á verjupartinum, meðan skjúttarnir tóku av møguleikanum, tá skjótast skuldi á málið hjá Jacob Larsen. Teir av skálafjørðinum vóru á odda í hálvleikinum við 13-11.

### Neistin avgjørdi

Neistin vann fyrra dystinum millum liðini við einum máli. Javnleikur var tískil nóg mikið hjá høvuðsstaðarfelagnum. Við geyðlandi áskoðarunum í rygginum og frálíka útgangsstøðinum komu havnarmenninir inn til seinna hálvleik sum eitt ódnarveður. Teir vunnu seg skjótt á javnt, men so steðgaði fullkomiliga upp. Ikki einans hjá Neistanum, men eisini á heimaliðnum. Málverjarnir vóru ongantíð settir undir veruligt trýst, og teir tóku sær lættiliga av forkølaðu skotroyndunum. Tað tóktist, sum tað brádliga kom leikararunum til hugs, hvør týdningur lá handan seinastu minuttunum. Sendingarnar vóru óneyvar, og nógv óneyðug mistøk vóru. Líka til, at leikandi venjarin hjá Neistanum, Ingi Olsen, tók ábyrgd. Hann bankaði bóltin framvið Marian Cirloganescu til støðuna 20-19, og bláu fjepparnir kókaðu. StÍF royndi at svara aftur, men teir megnaðu ongantíð at seta Neistan undir veruligt trýst. Tá Áki Mørk í síðsta minuttinum staðfesti sigurin á 23-21 var eingin ivi. Eftir átta ára bíðitíð er Neistin aftur føroyameistari. Hóast Claus Rasmussen byrjaði stóra arbeiðið í